Dimmalætting

# Motorsúkkluferðalandið Føroyar

Ferðavinna: Føroyar fara næsta ár at hava nógv ferðafólk sum koma til landið á motorsúkkluferð. Hetta satsar danska ferðamannastovan Cap's Adventure uppá

**Eyðhild Jacobsen** - ***email: eydhild@dimma.fo***
**Hósdagur 31. juli, kl. 12.44**
**142/142 - Heimatíðindi**

Cap's Adventure eitur ein donsk ferðamannastova, sum í fleiri ár hevur skipað fyri motorsúkkluferðum kring vesturheimin. Nógvir danir hava ígjøgnum øll hesi árini teknað seg til ferðir til Samsø, Frankaríki, Belgia og enntá USA. Og í nærmastu framtíð fara danir at hava møguleika til at koma til Føroya á motorsúkkluferð, tí Cap's Adventure hevur avgjørt at satsa upp á Føroyar sum eitt motorsúkkluferðaland.
– Tað eru nógvir danir, sum hava vent sær til mín og spurt, um vit ikki fara at skipa fyri ferðum til tykkara vøkru oyggjar, og tá ið mín góði vinur í Føroyum, Ove Ritter, eisini vísti áhuga fyri hesum, so fóru vit í gongd við at fáa hetta í lag, sigur Michael Christiansen, sum er stjóri á Cap's Adventure.
Tey á Cap's Adventure settu seg í samband við tey á Smyril Line og bóðu um samstarvshjálp.
– Vit spurdu um Smyril Line tímdi at samstarva við ferðing og innivisti, greiðir Michael frá.
Tey á Smyril Line vóru til dystin fús, og er samstarvið og ætlanin komin so langt nú, at Michael væntar, at longu í mai ella juni næsta ár, fer hann at senda fyrsta ferðalagið avstað.

Harðføra veðurlagið
Tað kann kanska undra mangan føroying, at tað yvirhøvur er møguligt, at ferðast í Føroyum á motorsúkklu, tí harðføra veðurlagið ger tað kanska ikki altíð møguligt at koyra á motorsúkklu kring oyggjarnar. Men Michael heldur, at harðføra veðurlagið er ein »attraktión« heldur enn ein forðing.
– Tað er kanska torført at skilja hjá tykkum, sum liva í tí harðføra veðurlagnum hvønn dag, men tað harðføra veðurlagið kann bergtaka mong. Tað er sera vakurt. Eg helt til dømis, tá ið eg var ein motorsúkklutúr uppi hjá tykkum, at tað var sera hugtakandi at koyra á motorsúkklu framvið tí brúsandi havinum, sum stoytti seg inni ímóti klettunum og kom sprænandi ímóti okkum.
Michael heldur ikki, at Cap's Adventure lokka ferðafólkini til Føroya, uttan at ferðafólkini vita, hvat tey koma til.
– Um ferðafólk vilja hava sól og summar, so ferðast tey suðureftir, har tey kunnu liggja á strondini allan dag. Men tað er blivið »in« og eksotiskt at ferðast norðureftir til støð sum Lapland og Føroyar.

Maturin og náttúran draga
Tey, sum fegin vilja reisa til Føroya við Cap's Adventure, eru serliga drigin at tí serstøku føroysku mentanini og føroysku náttúruni.
– Hetta vita vit væl, og tað er eisini hesum vit royna at lokka við. Eitt nú haldi eg, at tit hava serstakan mat og sertakar býir og bygdir. Og so er tað sjálvandi eisini tann vakra náttúran. Tað var heilt ótrúligt at uppliva náttúrina á motorsúkklu, tá ið eg var og ferðaðist í Føroyum. Hendan møguleikan fara vit í Cap´s Adventure nú at geva øllum fólkum, sigur Michael Christiansen.

© Dimmalætting